## Leita eftir gassi í Danmark

Amerikanska orkufelagið LLC ætlar sær at leita eftir gassi í undirgrundini ´s Sælandi. Felagið hevur biðið danska Orkustýrið um um loyvi at sleppa at leita á einum 1.000 ferkilometrar stórum øki millum býirnar Næstved og Køge. Hóast fleiri royndir hava feløg ikki funnið so olju og gass á landi í Danmark sum ymsastaðni úti í Norðsjónum. Kanningar hava tó avdúkað nakað av olju og gassi í undirgrundini á landi, og amerikanska felagið sigur seg hava góðar vónir um at fáa úrslit burtur úr leitingini á Sælandi. Steffan Olsen hjá Orkustýrinum sigur við blaðið Sjællandske, at leitingar við Karlebo á Norðursælandi hava givið rættiliga góðar ábendingar um, at olja og gass kunnu vera í undirgrundini har. Harafturat vísir hann á, at tað er munandi bíligari at útvinna olju og gass uppi á landi enn á sjónum.





*Tað eru tvey spennandi nøvn – eitt føroyskt og eitt útlendskt – sum nú eru komin á plakatina hjá Jóansøkufestivalinum*



# Jens Marni og DJ Flemse á Jóansøkufestivalinum

**Jóansøkufestivalurin avdúkar nú tvey nøvn afturat, og tey eru Jens Marni Hansen og DJ Flemse. Jens Marna kenna tey flestu sum fløguaktuellan rocksangara, men eisini sum troubadour, og DJ Flemse vann í fjør danska meistaraheitið innan mobildiskotek**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Jóansøkufestivalurin er stuðulskonsert til frama fyri at gera saltsiloina á Drelnesi til norðurlenskt mentanarhús. Tískil er luttakaralistin á tremur við góðum føroyskum nøvnum, ið stuðla, men eisini danin DJ Flemse verður við.

DJ Flemse er ikki ein og hvør. Síðani hann var 14 ára gamal hevur hann átt og rikið egið mobildiskotek. Hann er dugnaligur og væl umtóktur, og hevur sum elektrikkari skil fyri útgerðini, eins væl og tónleikinum.

At hann er dugnaligur fekst prógv fyri í 2008, tá hann vann danska meistaraheitið innan mobildiskotek.

### Jens Marni

Jens Marni Hansen, og manning hansara í Faktor 4, verða eisini við á Jóansøkufestivalinum. Jens Marni kom fram við bólkinum Kjølar, síðani við All That Rain, og so superbólkinum Showmenn. Men eisini hevur hann alla tíðina víst seg á egnum beinum sum troubadour.

Hann hevur í eina tíð havt egnan bólk aftan fyri seg, og fyrsti stuttum kom so fyrsta fløga hansara undir egnum navni, har hann aftur prógvar sínar dygdir sum rocksangari.

Jens Marni er millum teir fremstu í Føroyum í dag, og hevur víst seg sum ein, ið tekur tónleikin í álvara, og hetta hevur eisini borið hann langt fram á leið. Hann er í dag millum virknastu og best dámdu tónleikarar í landinum.

Jóansøkufestivalurin hevur hervið longt luttakaralistan við tveimum nøvnum, og sær listin soleiðis út nú; Crawling Blue, 200, Martin Joensen, Páll Finnur Páll, Jens Marni Hansen og DJ Flemse. Jóansøkufestivalurin avdúkar fleiri nøvn í komandi viku.

# Heimasíða til sjálvhjálp

**Sjálvhjálparbólkurin Berin hevur fingið heimasíðu, www.berin.fo**

SJÁLVHJÁLP
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Endamál Berans er, at geva børnum og ungum, ið hava mist foreldur og ella systkin við deyða, eitt forum, har tey kunnu møtast og práta við javnlík.

Sjálvhjálparbólkurin bleiv stovnaður í 2003. Aldurin fyri luttøku er 8 ár og eldri. Higartil hava uml. 250 børn og ung verið við. Nakrir bólkar hava eisini verið fyri vaksin, ið hava mist børn.

Sjálvhjálparbólkarnir skulu virka fyri, at børnini og tey ungu, sum frálíður, gerast betur før fyri at handfara sorgina yvir mista foreldrið/systkini. Á tann hátt hava tey størri møguleika fyri aftur at fáa eitt gott og innihaldsríkt lív, har tey kunnu mennast og liva við missinum.

Børn og ung, sum hava mist foreldur ella systkin fyri fleiri árum síðani, hava eisini havt gleði av bólkunum.

Børnini og tey ungu møtast aðru hvørja viku. Við serkønari hjálp og vegleiðing, práta tey saman um felags upplivingar, kenslur og tankar.

Berin merkir á donskum lysning, ofta brúkt sum en lysning i skoven, eitt stað, har sólin altíð sleppur framat. Á føroyskum kunnu vit eisini brúka hugtakið berajól, sita á berajólum, uttan verju, nakað sum tey ið mist hava, kenna alt ov væl. Harumframt kann navnið Berin, fáa ein at hugsa um at bera. Lyfta vit í felag, kennist byrðan lættari.

Búmerkið, er ímyndin av lívinum við sínum ljósu og myrku síðum. Tað skal minna okkum á, at sjálvt tá tað sær svartast út, ber til at leita eftir glottum. Og tá ið alt sær ljóst út, er tað tann svarta rípan, sum ger mynstrið.

## Ítróttardagurin í Leirvík

**Fríggjadagin 15. maj verður árligi ítróttardagurin, ið Stuðulstænastan hjá Nærverkinum og Sinnisbati skipa fyri**

ÍTRÓTTARDAGUR
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Ítróttardagurin er ætlaður fólki við avmarkaðum sálarligum førleika og starvsfólkum, ið arbeiða innan hetta økið.

Endamálið við ítróttardegnum er fyrst og fremst at hava tað stuttligt saman, at røra seg og síðst, men ikki minst, at knýta sambond millum tey luttakandi.

Dagurin verður hildin á ítróttarøkinum í Leirvík. Byrjað verður kl. 8.30 við felags morgunmati, ið Eysturkommuna bjóðar. Jóhan Christiansen, borgarstjóri í Eysturkommunu, bjóðar vælkomin og Mary í Garði, stjóri í Nærverkinum, heldur røðu.

Fyrrapartin verður kappast í fótbólti og boccia og seinnapartin í stafettrenning og rundbólti. Tá kappingarnar eru lidnar, handar Regin Johansen, deildarleiðari í Stuðulstænastuni, heiðursmerki til vinnararnar.

Seinnapartin verður fótbóltsdystur millum starvsfólk í Nærverkinum og starvsfólk í Almannamálaráðnum. Dómari í dystinum verður Kaj Leo Johannesen, løgmaður.

Dagurin endar við felags borðhaldi, har Rósa Samuelsen heldur røðu, orkestrið Menniskja spælir tónleik og Jákup Weihe undirheldur.